# Nýtt koyrikort 10. hvørt ár

**Gongur sum ES ætlar, skulu allir danir endurnýggja koyrikort síni 10. hvørt ár. Samstundis kann verða kravt, at sjónroynd skal takast av øllum persónum omanfyri 45 ár**

KOYRING
*Snorri Brend*



*Ein nýggj kunngerð um koyrikort er á veg bæði í Føroyum og í ES. Í ES skulu borgararnir nú upp til koyriroynd 10. hvørt ár, meðan ein í Føroyum nú umhugsar at geva fólki eitt royndarkoyrikort, sum skal galda í tvey ár*

*Gjørt mynd: Bárður*

Hetta uppskotið arbeiðir ein ES-nevnd við í løtuni.

Nevndin er sett at koma við uppskoti um eina nýggja kunngerð um koyrikort, har ein setir upp yvirskipaðar karmar fyri treytirnar við koyrikortunum.

Í Føroyum og Danmark kunnu øll omanfyri 18 ár fara upp til koyriroynd. Hetta koyrikortið er vanliga galdandi til persónurin fyllir sjúti ár.

Nú umhugsar ES at seta eina avmarking á gildi við koyrikortinum til 10 ár. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan sviki og fyri at økja um gjøgnumskygnið, vita donsk bløð at siga.

## 100 ymisk sløg

Samstundis við hesar broytingarnar verður umhugsað at krevja av bilførarum, at teir fara til reglu ligt heilsueftirlit, tá gildið av koyrikortinum er úti.

Borgarar í øllum ES-londum kunnu í dag gera nýtslu av 110 ymiskum sløgum av nationalum koyrikortum í øllum EU, har treytirnar eru sera ymiskar.

Meðan danir kunnu varðveita sítt koyrikort til teir er vorðnir sjúti, so skulu sviar endurnýggja sítt koyrikort aftaná 10 ár, meðan ein týskari hevur sítt koyrikort fyri lívið.

Sambært uppskotinum forðar hetta fyri flutninginum hjá borgarunum í ES.

## Koyriroynd vantar

Henda gongdin við koyrikortunum í ES, Danmark og triðjalondum hava tey í danska Rigspolitiet eisini hoyrt um.

Ríkisløgreglan hevur tí umhugsað at taka allar reglur og viðurskifti við donskum koyrikortum upp til nýggja viðgerð.

Í dag kunnu borgarar úr einum hópi av triðjalondum fáa býtt koyrikort síni um til eitt danskt koyrikort uttan at neyðugt er at taka eina eftiransaða koyriroynd.

Hetta umfatar m.a. borgarar úr so ymiskum londum sum teimum í fyrrverandi Sovjetsamveldinum og Etiopien.

– Vit arbeiða tí við at fáa henda rættin til umbýting avtiknan, sigur politimeistarin, Mogens Hendriksen frá ferðsludeildini hjá Ríkisløgregluni.

# Nýggj kunngerð við sama innihaldi

**Nýggj kunngerð um koyrikort er á veg fyri Føroyar, men har verður hildið fast við gomlu skipanina. Einki verður um ætlarnirnar í ES um broyttu gildistíðina fyri koyrikort, men hinvegin so verður ein ætlan um royndarkoyrikort nevnd**

KOYRING
*Snorri Brend*

Enn er henda kunngerðin ikki sett í gildi, men tá hon verður tað um stutta tíð, so kann ein tílík skipan verða sett í verk.

Landsstýrið kann nevniliga gera av, at tá eitt koyrikort verður tikið á fyrsta sinni, verður tað útgivið við upp til tvey ára gildistíð.

Sagt verður, at áðrenn gildistíðin er farin skal eigarin fáa eykalæru og taka nýggja roynd í serstøkum førleika í akstri. Hetta verður gjørt sum ein treyt fyri at eigarin kann hava koyrikortið til sín sjúti ára dag.

Í hesum sambandi setir landsstýrið eisini reglur fyri eykalæruna og fyri royndina. Reglur skulu eisini setast fyri avleiðingunum av, um læran og royndin ikki eru tiknar áðrenn gildistíðin er úti.

Kunngerðin til hesa løgtingslógina er á veg, og verður hon væntandi sett í gildi um ein mánað ella so, verður upplýst úr Vinnumálaráðnum.

Endamálið við hesum er sjálvandi at gera okkara koyrikort so eins teimum í øðrum londum, t.d. í ES, soleiðis at føroyingar ikki skulu fáa trupulleikar við ferðsluløgregluni í hesum londum ella um teir ynskja at leiga sær ein bil.

Upplýst verður at ein allatíðina fylgir væl við, hvat hendir innan ferðsluøkið í ES. Og verða broytingar framdar har, so verður tað málið eisini tikið upp til umrøðu her á landi.

## Tríggjar treytir

Kunngerðin snýr seg ikki bert um koyrikort, men koyrikortini er ein partur av hesi umfatandi lógarkunngerðini um ferðslu, sum seinast varð broytt við løgtingslóg nrr. 65 frá 17. mai í ár.

Tá talan er um koyrikort til motorakfør sigur lógin hetta:

Skalt tú taka koyrikort í Føroyum so krevur tú at uppfylla tríggjar treytir eftir nýggju kunngerðini.

Tann fyrsta er, at tú skalt verða fyltur 18 ár. Í øðrum lagi verður kravt, at ein hevur nóg góð eygu og oyru, og annars hevur neyðugan andligan og likamligan førleika.

Og í triðja lagi verður sagt, at persónurin við eini roynd skal prógva, at hann hevur tørvandi dugnaskap í akstri og neyðugan kunnleika til akfarið og viðferð tess og til ferðslureglarnar.

## Til 70 ár

Í kunngerðini er eisini eitt punkt um gildi hjá koyrikorti.

Her verður sligið fast, at koyrikortið hevur gildi til eigarin hevur fylt 70 ár. Hinvegin so kann gevast styttri gildistíð fyri ávís sløg av akførum.

Landsstýrið setir reglur um gildistíðina hjá koyrikortum, ið eru latin persónum sum hava fylt 70 ár. Og sagt verður eisini, at landsstýrið kann skipa fyri, at gildistíðin fyri hesar persónar kann gerast styttri.

Tá ið gildistíðin er úti, kann koyrikortið verða endurnýggjað um eigari lýkur treytirnar. Myndugleikin sum gevur út koyrikortini kann her gera av, um nýggj roynd skal verða tikin. Og her kann so landsstýrið seta reglur um nýggja royndartøku.

Sligið verður eisini fast, at landsstýrið ásetur reglur um umbýti av koyrikorti.

## Nýtt navn og nýtt innihald

**Hotell:** Mánadagin broytti Sjómansheimið í Havn til Hotel Tórshavn, nú nýggju eigararnir tóku yvir hetta 82 ára gamla heimið.

Umframt hotellvirksemið hevur Sjómansheimið m.a. staðið fyri ymiskum tiltøkum fyri sjófólk okkara. Millum annað hevur minningarhald teirra sjólætnu verið á Sjómansheiminum, eins og savnaðir hava verið saman jólapakkar til sjófólkið.

Ein av stýrislimunum í Sjómansheiminum er Óli Jacobsen. Í grein í seinastu útgávuni av FF-blaðnum skrivar hann um Sjómansheimið og omanfyri nevndu tiltøk.

– Minningarhaldið fer at halda áfram, men helst á øðrum staði, slær Óli fast.

Tá talan er um jólapakkarnar verður eisini funnin ein loysn á hesum spurningi.

Altjóða flutningsfelagsskapurin læt í síni tíð eina upphædd til Sjómansheimið. Semja er um, at henda upphæddin framvegis skal nýtast til vælferð hjá sjómonnum.

Júst hvussu hetta skal gerast er ikki avgjørt enn, sigur Óli í greinini.

**sb.**

## Góð undirtøka til deyvastevnu

**Havn:** Seinni í hesum mánaðinum verður skipað fyri serstakari norðurlendskari stevnu fyri deyv í Norðurlandahúsinum.

Hetta er stevna har deyv, deyvatulkar og onnur fáa møguleika at hittast og tosa um royndir í arbeiði sínum í teim ymisku londunum.

Fyrireikingarnar til stevnuna hava gingið sera væl, og tað sama kann eisini sigast um undirtøkuna.

Higartil eru teknað omanfyri 100 luttakarar úr útlandinum, meðan einir 50 verða úr Føroyum.

Stevnan byrjar 21. august og endar 28. august. Nevnast kann, at mánakvøldið 29. august verður serstakt hugnakvøld fyri luttakararnar á stevnuni. Hetta hugnakvøldið er kortini ikki alment, verður upplýst.

**sb.**